# Umsókn um Restskuldartrygging



| | | |
|---|---|---|
| **Upplýsingar um tryggjaða** | Navn: | |
| | Bústaður: | |
| | Postnr.: | Bygd/býur: |
| | Telefonnummar: | P-tal: |
| | Starv: | |

*Undirritaði søkir við hesum um at verða tryggjað/ur við restskuldartrygging í BankNordik. Tryggingin verður stovnað til trygd fyri allari skuld hjá undirritaða í P/F BankNordik, undir hesum skuld upptikin í DLR umvegis BankNordik.*

| | | |
|---|---|---|
| **Upplýsingar um Restskuldartryggingina** | Eg ynski fylgjandi trygging/ar og tryggingarupphædd/ir: | |
| | **Restskuldartrygging** | Tryggingarupphædd: |
| | ☐ Nýggj trygging | ☐ 575.000 kr. |
| | ☐ Broyting av verandi tryggingarupphædd | ☐ 800.000 kr. |
| | ☐ Broyting av verandi trygging til at fevna um alla skuld hjá undirritaða í P/F BankNordik, undir hesum skuld upptikin í DLR umvegis BankNordik | ☐ 1.150.000 kr.<br>☐ 1.700.000 kr. |
| | Fyri at tekna Bráðsjúkutrygging og/ella Óarbeiðsføristrygging sum ískoyti til Restskuldartrygging er tað eitt krav, at tú teknar eina Restskuldartrygging á í minsta lagi 500.000 kr. | |
| | **Fulnaður fyri Bráðsjúkutrygging** | Tryggingarupphædd: |
| | ☐ Nýggj trygging | ☐ kr.230.000 fyri vaksin og kr. 130.000 fyri børn |
| | ☐ Broyting av verandi tryggingarupphædd | ☐ kr. 115.000 fyri vaksin og kr. 69.000 fyri børn |
| | **Fulnaður fyri óarbeiðsføri** | Tryggingarupphædd: |
| | ☐ Nýggj trygging | ☐ Árlig veiting kr. 92.900 |
| **Tryggingargjald** | Tryggingargjaldið, sum verður goldið frammanundan mánaðarliga, skal skuldskrivast fylgjandi kontu/kontum:<br>Fyri óarbeiðsføri Eftirlønarkontu nr.:____________________<br>Fyri aðrar veitingar kontu nr.:____________________<br>Legg til merkis, at fyri óarbeiðsføri skal tryggingargjaldið skuldskrivast Eftirlønarkontuni, meðan tað fyri aðrar veitingar kann skuldskrivast aðrari kontu. | |

**Útgjald, tilskilan og gildiskoma**
Í sambandi við útgjald við deyða verður skuldin hjá undirritaða niðurgoldin. Um samlaða skuldin er hægri enn tryggingarupphæddin, stendur tað BankNordik frítt at velja, hvør partur av skuldini hjá undirritaða verður goldin.

Tryggingarupphæddin rindar sostatt restskuldina, tó í mesta lagi tí upphædd, sum tryggjaði teknar seg fyri. Samlaða skuldin kann tískil vera hægri enn tryggingarupphæddin

Um tryggingarupphæddin er hægri enn samlaða restskuldin, verður avlopið goldið til næsta avvarðandi.
Næstu avvarðandi eru hjúnafelagi, sambúgvi*, børn, arvingar sambært testamenti ella arvingar sambært lógini.

*Sambúgvin skal liva saman við tryggjaða á felags bústaði og
1) vænta, hava ella hava havt eitt barn saman við tryggjaða ella
2) hava livað saman við tryggjaða í hjúnabandslíknandi samlívi á tí felags bústaðnum tey síðstu tvey árini innan andlátið.

Um tryggjaði ynskir, at avlopið skal ognast øðrum enn næstu avvarðandi, skal oyðublaðið Broyting av tilskilan nýtast til at geva skrivlig boð um hetta.

☐ Tryggingin tekur við, tá undirskrivað umsókn er latin BankNordik, treytað av at heilsuváttanin verður góðkend av NordikLív.
☐ Tryggingin tekur við tann_______ 20____, treytað av, at heilsuváttanin verður góðkend av NordikLív.

| | |
|---|---|
| **Undirskrift** | Eg vátti at hava fingið útflýggjað, lisið og góðtikið upptøkutreytirnar fyri Restskuldartryggingina. Somuleiðis vátti eg at hava lisið kunningina um viðgerð av persónsupplýsingum í NordikLív. Kunningin er at finna á heimasíðuni hjá BankNordik: www.banknordik.fo/NordikPensjon/skjol<br>Eg vátti við hesum, at Restskuldartryggingin verður veðsett til BankNordik, sambært § 3 í upptøkutreytunum.<br><br>_______________ tann __________ 20_____ _______________________<br>Undirskrift |

| | |
|---|---|
| **Viðmerkingar bankans** | |

## Upptøkutreytir

### § 1

1. Sjálvbodna Restskuldartryggingin fevnir um trygging fyri alla skuld til BankNordik, íroknað skuld upptikin í DLR Kredit A/S umvegis BankNordik. Um samlaða restskuldin er lægri enn tryggingarupphæddin, verður restupphæddin útgoldin til næsta avvarðandi, um ikki annað er avtalað.

2. Tað er ein treyt, at lántakari, ið søkir um Restskuldar-trygging, hevur fullan arbeiðsførleika og ikki er fylt/ur 51 ár. Heilsulýsing verður send til NordikLív til góðkenningar.

3. Um tryggjaði doyr, áðrenn hann/hon fyllir 67 ár, verður tryggingarupphæddin útgoldin sambært § 3, stk. 4 – 6.

4. Tryggingargjaldið verður ásett samsvarandi konsessión fyri bólkalívstryggingar, ið er galdandi fyri NordikLív.

5. Av tí at tryggingargjaldið til hesa Restskuldartrygging ikki verður drigið frá í persónligu skattainntøkuni, skal ikki rindast avgjald til landskassan av tryggingarveiting, ið verður útgoldin við deyða.

### § 2

1. Restskuldartryggingin er virkin, beinanvegin treytirnar í § 1 eru uppfyltar, og undirskrivað umsóknarblað um Restskuldartrygging er latið BankNordik.

2. Avtalan um Restskuldartrygging fer úr gildi, tá ið tryggjaði ella BankNordik skrivliga sigur tryggingaravtaluna upp, ella við endan av tí ársfjórðingi, tá ið tryggjaði fyllir 67 ár. Tó er tryggingartíðarskeiðið fyri óarbeiðsføri til 60 ára aldur og fyri bráðsjúkutrygging hjá børnum til 18 ára aldur.

### § 3

1. Í teimum førum har trygging ikki kann teknast uttan nærri heilsuupplýsingar, fær BankNordik beinanvegin boð um hetta. Tá verður umbønin løgd til síðis, til NordikLív hevur fingið útflýggjað og góðkent neyðugu heilsuupplýsingarnar.
2. Verður tryggjaða skuldin hækkað, skal nýggj heilsulýsing útfyllast og góðkennast av NordikLív.
3. Restskuldartryggingin verður veðsett til BankNordik.

4. Tryggingarupphæddin, ið verður útgoldin, skal nýtast til at afturrinda skuld sambært § 1, stk. 1 í hesum upptøkutreytum. Um samlaða restskuldin er hægri enn tryggingarupphæddin, kann BankNordik eftir egnum vali áseta, hvør partur av restskuldini verður afturgoldin. Um samlaða restskuldin er lægri enn tryggingarupphæddin, verður restupphæddin útgoldin til næsta avvarðandi, um ikki annað er avtalað.

5. Um ikki annað er avtalað, verður tann parturin av tryggingar-upphæddini, sum skal gjaldast út, útgoldin til næsta avvarðandi. Næstu avvarðandi eru hjúnafelagi, sambúgvi*, børn, arvingar sambært testamenti ella arvingar sambært lógini.

   *Sambúgvin skal liva saman við tryggjaða á felags bústaði og
   1) vænta, hava ella hava havt eitt barn saman við tryggjaða ella
   2) hava livað saman við tryggjaða í hjúnabandslíknandi samlívi á tí felags bústaðnum tey síðstu tvey árini innan andlátið.

6. Við skrivligari áheitan ber til at broyta § 3, stk. 5, soleiðis at útgjald við deyða verður goldið til onnur enn næsta avvarðandi. Tryggjaði váttar, at hann/hon hvørki munnliga ella skrivliga hevur sagt rættin frá sær at broyta tilskilanina.

### § 4

1. Um tryggjaði ynskir at tekna eina Óarbeiðsføristrygging og/ella Bráðsjúkutrygging, sum ískoyti til Restskuldartryggingina, er tað ein treyt, at tryggjaði hevur ella samstundis teknar eina Restskuldartrygging á í minsta lagi kr. 575.000.

### § 5

1. Restskuldartryggingin er teknað sambært galdandi tryggingartreytum hjá NordikLív, og eru ivamál, eru hesar tryggingartreytir galdandi. Tó fevnir hendan Restskuldartrygging ikki um rætt til gjaldsundantøku við óarbeiðsføri og gevur ikki rætt til at tekna framhaldstrygging.